*»Hugurin at spæla hevur altíð verið góður. Og tað er hann enn, hóast fingrarnir ikki eru eins fimir í spælinum í dag, sum teir vóru áður«*



*Fyrstu ferð Gudrid Sørensen spældi til gudstænastu var hon bert 13 ára gomul. 62 ár seinni spælir hon við sama lag, og fyri hetta trúfestið fekk hon fortjenstmedalju frá kongshúsinum fyri hesa tænastuna*

# Trúføst tænasta í kirkjuni

Gudrid er ein av mongum urguleikarum í Føroyum. Summir teirra fáa samsýning fyri arbeiði sítt, og aðrir ikki.

Felags fyri teir allar er, at teir útinna hesa tænastuna trúfast og í kærleika til kirkjuna hvønn einasta sunnu- og halgidag í kirkjuárinum.

- Eg veit ikki, hvussu tað ber til, men mær hevur dámt hetta sera væl. Eingin hevur nakrantíð hoyrt meg siga, at eg tími ikki at spæla í dag, ella at eg eri farin frá húsum við ringum huga.

- Eg havi fingið sera góðan stuðul heimanífrá. Hóast vit fingu børn, høvdu handil, høvdu kríatúr og maðurin var sjúkur, so ótu vit kortini altíð døgurða sunnudag!, sigur hon brosandi.

## Í góðari tíð

At skipa eina gudstænastu krevur gott samstarv millum prestin og kirkjutænarnar, millum annað tá talan er um at velja sálmar og at fáa møguleika at venja teir frammanundan.

- Eg fái vanliga sálmarnar í góðari tíð frammanundan, sum oftast fríggjadagin fyri. Eg havi orgul heima, og kann so venja sálmar við hús áðrenn gudstænastuna.

- Men sjálvandi, - onkutíð kann tað koma fyri, at eg fyrst fái sálmarnar sama morgun. Tað er kortini sjáldan, greiðir Gudrid frá.

Í eini tíð har nógvar kirkjur, bæði í Føroyum og uttanlands rópa eftir urguleikarum, hevur Gudrid trúføst røkt hesa týdningarmiklu tænastuna í Guds ríkis arbeiði.

- Ja, í september mánaði í ár verða tað faktiskt 51 ár, síðani eg byrjaði at spæla her í Viðareiðis kirkju.

- Hetta hava verið 51 góð ár, sigur Gudrid Sørensen.




